# Ljósini kunnu sløkkjast…

**Tað er beinleiðis lívshættisligt at seta bilin við fullum ljósum – og í skeivari síðu. Hóast fólk eru deyð av hesi orsøk, so er henda líkasæla kortini daglig sjón…**

LJÓSFØRING
*Eirikur Lindenskov*

Ferðast tú í ferðsluni í Havn, so fært tú skjótt staðfest, at nógvir bilførarar eru, ið ikki hava ta mest grundleggjandi vitanina um ljósføring. Koyrir tú fram við eini kiosk á kvøldi ella framvið skúlunum um morgnarnar, so grettir ikki, at fleiri bilar standa við fullum ljósum og blenda mótkoyrandi ferðsluna.

Hjástandandi myndin er tikin uttan fyri Kiosk Activ í J. Broncksgøtu í Havn mikukvøldið. Førarin er farin inn í kioskina at keypa, og hevur koyrt so nær dyrnum, hann sleppur.

Bilurin stendur fyri tað fyrsta í skeivari síðu. Hann stendur við fullum ljósum, nærljósum. Hann stendur nakrar sentimetrar framman fyri gonguteigin. Hann stendur manntómur og blendar alla mótkoyrandi ferðslu.

Bilførarin á hesum bili setir onnur fólk í ferðsluni í beinleiðis lívsvanda – bara tí at hann ikki tímir at sløkkja nærljósini!

Og fyri at tað ikki skal vera lygn, so er als ikki loyvt at parkera uttan fyri Kiosk Activ.

Tað tykist trupult hjá summum at skilja, hvussu ljósini á bilinum skulu brúkast:

Parkeringsljós (ella støðuljós) eiga at verða nýtt tá bilurin stendur stillur.

Nærljósini eiga at verða nýtt, tá tú koyrir, og tú ikki skal blenda mótkoyrandi ferðslu, t. d. í býarkoyring.

Fjarljósini verða nýtt, tá tú koyrir eitt nú millum bygda, og onga mótkoyrandi ferðslu hevur.

Hesin bilførarin er ikki nakað eindømi, tíverri. Tí soleiðis verður ferðslan sum nevnt eisini blendað uttan fyri skúlarnar um morgnarnar, t. d. her úti á Argjum. Tað kann undra, at foreldur, sum koyra børnini í skúla – fyri at tey skulu koma trygt í skúla, samstundis seta síni egnu børn – og øll hini við, í stóran vanda, bara tí at tey ikki tíma at nýta ljósini rætt.

– Hetta er sjálvandi nakað, sum vit hugsa nógv um, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd, og vísir til lýsingar, tey hava havt seinastu tíðina, m. a. júst um hetta at seta bilin uttan fyri eina kiosk við fullum ljósum í myrkri – og at parkera í rættari síðu.

– Júst hatta økið, ið myndir vísir, er eitt gott dømi, sigur Jón Kragesteen.

– Har er loyvt at koyra 50 km/t, og tað gera helst tey flestu, um onkur kanska setir ferðina niður, tá ein bilur stendur so óforsvarliga parkeraður, sum dømið vísir.

Jón Kragesteen heldur, at júst hetta økið átti at verði gjørt soleiðis, at forðingar vóru, sum settu ferðina niður, tí har er nógv ferðsla, bæði bilar og fólk til gongu. Hinumegin vegin er Almannastovan, og har vitja nógv fólk dagliga.

Hóast tað kanska ikki hendir so ofta, so eru tragisk dømi um, at fólk eru deyð sum beinleiðis orsøk av, at bilur hevur staðið stillur í skeivari síðu við fullum ljósum.

– Hetta er sera vandamikið, tí tá koyrt verður í myrkri síggja vit bara ein 10.000 part av tí, sum vit síggja í sólarljósi. Tá tú so eisini verður blendaður, ert tú sera illa førur fyri at síggja vandar og uppfata heildina, sigur Jón Kragesteen.

Hann vísir eisini á, at í dag skulu øll, sum taka koyrikoyrt, á skeið í myrkakoyring. Hetta er ein beinleiðis avleiðing av eini álvarsamari ferðsluvanlukku á Kambsdali fyri nøkrum árum síðani, har tvær ungar kvinnur doyðu av somu orsøk, sum hetta dømið vísir.

Leiðarin á Ferðslutrygd minnir eisini á, at tað er sera umráðandi hjá gongufólki at nýta endurskin – tí tá síggjast tey í minsta lagi úr 140 metrum í hálvaskýming.



*Førarin á hesum bili hevði ikki stundir at sløkkja ljósini, tá hann mikukvøldið fór inn í Kiosk Activ í Havn at keypa. Tískil setti hann onnur fólk í ferðsluni í lívsvanda…*

Frá
Maskinmeistarafelagnum

Í sambandi við, at vit eru fluttir í egin høll á Grønlandsvegi 58, verður móttøka fyri limum og viðskiftafólkum í dag frá kl. 15-18

Nýggja búmerki felagsins verður avdúkað

Nevndin

†

Sagt verður frá, at okkara kæri maður, pápi, abbi og langabbi

**Johannes Sigurd Danielsen**

andaðist í heiminum mikumorgunin 23. okt., 85 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer leygardagin 26. okt. kl. 13.30.

*Fyri tey avvarðandi*

**Nena**

Tey, ið vilja minnast Sigurd, kunnu lata Evangelisku Røddini eina peningagávu, konto í Føroya Banka.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at góða mamma okkara, vermamma, omma og langomma

**Jóhanna Sivertsen**

andaðist í Vestmanna mikudagin 23. okt., 70 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Funnings kirkju sunnudagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Kristian, Petur, Bjørg, Fróði og Beinta**

Tey, ið vilja minnast Jóhonnu, kunnu ístaðin fyri blómur lata eina peningagávu til Dagtilhaldið í Rók, konto nr. 131.696.8 í Føroya Sparikassa.

# Wanna-be kapping á Torginum í SMS

**Fríggjadagin og leygardagin verður sepnnandi og øðrvísi tiltak fyri børn og ung í aldrinum 0-15 ár á Torginum í SMS: Tá skipa tey í SMS fyri tí, tey rópa »Wanna-be kapping«**

VILJA-VERA-SUM
*Tíðindaskriv*





Í ensku orðagreipuni stendur, at Wanna-Be, merkir at vilja-vera-sum. Og tað er júst hetta, ið kappingin snýr seg um, nevnliga, at luttakararnir skulu líkjast onkrum kendum sangara ella songkonu so nógv sum gjørligt.

Tey í SMS hava tónleikin, meðan luttakararnir skulu sjálvir skipa fyri framførsluni.

Kappingin fevnir um tveir dagar ella kvøld.

– Byrjað verður við einum undanumfari fríggjadagin 25. oktobur kl. 17.30. Sjálvt finaluumfarið verður leygardagin 26. oktobur kl. 13.00, sigur Rógvi Róin, marknaðarleiðari í SMS.

Á Torginum er settur upp ein pallur, har tilmeldaðir luttakarar sleppa at royna seg sum teirra tónleikarafyrimynd. Meira luttakarin líkist - klæðir, smyrsl, dansifet, andlitskeipur - størri er møguleikin at sleppa í finaluna, ið verður leygardagin 26. oktobur.



Luttakararnir syngja ikki sjálvir, men tað er hinvegin av týdningi, at teir kenna tekstin, tí, sum sagt, meir teir líkjast, størri er møguleikin at vinna. Dómarar verða fólk, ið antin fáast við at spæla eitthvørt á leikpalli ella hava annað viðkomandi yrki. Íalt 17 luttakarar hava boðað frá luttøku, og av teimum sleppa íalt 8 víðari í finaluumfarið, sum verður leygardagin.

Vertir til tiltakið á Torginum í SMS verða Tróndur Vatnhamar og Heri Jacobsen. Tað eru Pepsi, Føroya Sparikassi, og SMS í felag, sum skipa fyri kappingini, og sum lata vinningar til nr. 1, 2 og 3. Allir luttakararnir fáa eitt heiðursbræv og eina Pepsi Twist sodavatn og t-shirt.



# Clickhaze og Krit ríða enn á bylgjuni

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*



Farirwaves, føroyska bylgjan í Íslandi, er komin í helvt og á fyri framman eru fleiri konsertir. Møguliga er hetta eitt stig longur út í heim

Mikudagin og hósdagin hava fleiri konsertir verið á skránni hjá Clickhaze og Krit. Fríggjadagin 25. oktober spæla Clickhaze beinleiðis á landsumfatandi útvarpsrásini Rás 2, www.ruv.is. Hetta er klokkan 15 íslendska tíð. Á kvøldi leikar Krit á konsert í Hitt Húsinum saman við íslendskum bólkum.

Tann 26. oktober spæla Clickhaze og Krit í Austurbæjarbio í Reykjavík. Rás 2 tekur upp og sjónvarpið verður eisini til staðar.

Síðani 16. oktober hevur føroyska byljgan, tiltakið Fairwaves, verið í gongd og fleiri føroyskir tónleikarar hava gjørt vart við seg. Tað er gerandiskostur at síggja føroyingar í sjónvarpi og hoyra teir í útvarpi. Og neyvan fer dagur framvið, at ikki okkurt stendur í íslendsku bløðunum.

Jens Guð, sum er við til at fyrireika Fairwaves, sigur, at herfyri gjørdi CNN innslag um, hvussu væl tað gongur hjá íslendskum tónleiki á altjóða marknaðinum. Nevnast kunnu nøvn sum Bjørk, Mezzoforte, Sigur Rós og fleiri onnur. Jens Guð sigur, at ætlanin við Fairwaves er greið, nevniliga at gera føroyskan tónleik kendan í Íslandi fyrst, fyri síðani at taka hann víðari í hølunum á íslendskum tónleiki út í heim.

Hann ivast ikki í, at føroyskur tónleikur megnar hetta, tí støðið er hækkað seinnu árini, og serliga eru tað Clickhaze og Týr, sum hann metir hava møguleika, tí teir byggja nútímans tónleik á siðbundnan tónleik. Felags fyri fleiri av stóru íslendsku nøvnunum er, at tey spæla ikki mainstream tónleik, men eru serstøk.





## Skeið í fiskaflutningi

Fiskivinnuskúlin skipar fyri skeiði í smittufyribyrging í samband við flutning av fiski á sjógvi og landi 7. november 2002 á Hotel Føroyum.

**Málbólkur:** Starvsfólk á alistøðum og fólk, sum hava við flutning av fiski at gera

**Undirvisarar:** Peter S. Østergaard, Øssur Hansen og Ingi Joensen frá Fiskasjúkudeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni

**Skipan:** Skeiðið verður á Hotel Føroyum í Havn

**Skeiðskostnaður:** Kr. 2.000 (verður kravt inn undan skeiðnum)

**Undirvist verður m.a. um:** Fiskasjúkustøðuna, sóttreinsing av flutningstólum og frárensluvatni, skjøl í samband við flutning av fiski,og hvussu smittufyribyrging best verður skipað í samband við flutning av fiski á sjógvi og landi.

Tilmelding fer fram við at senda ella faxa innskrivingarseðilin til

**Fiskivinnuskúlan, 350 Vestmanna.**

Telefax nummarið er **424 428**. Til ber eisini at ringja til skúlan og boða frá luttøku ella senda teldupost.

Tilmeldingin er bindandi. Skeiðið er treytað av nóg stórari undirtøku.

**Innskrivingarseðil:**

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tlf. arbeiði: |
| Postnr./stað: | Tlf. heima: |
| Teldupostur: | Gjaldari: |

FISKIVINNUSKÚLIN

Fiskivinnuskúlin
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73
fax 42 44 28
Teldupostur:
fiskvest@fiskvest.fo

Scanpan

Við titanbelegningi. Vælegnað at steikja feittfrítt og nýta stálreiðskap. Tær eru lættar at reingerða og kunnu fara í ovn upp til 260°



| | |
|---|---|
| 24 cm | 350,- |
| 28 cm | 425,- |
| 32 cm | 450,- |
| Wok v/ rist + pinnum | 690,- |

Thomas Dam búnýti
á Hagabili · Tlf 447601
Niels Finsensgøta 18 · Box 1094 · FO 110 Tórshavn · Tlf 314930 · Fax 314933

SCANBAD BAÐIRÚMSINNBÚGV





V.V.S. HORNIÐ
Landavegur 2 · Tórshavn
Tel. 318023 · Fax 310963